Andstøðutingmenn sera ónøgdir við avgerð løgmans at koyra Árna Olafsson frá:

Løgmaður setir kíla í oljuhjólið

-Eg haldi tað vera sera óheppið, at løgmaður, sum annars hevur lagt dent, at vit standa saman sum ein maður í oljumálinum, nú áðrenn oljulóggávan er samtykt, koyrir tann dugnaliga formannin í Oljuráðleggingarnevndini frá. Hetta er ikki eitt gott signal til umheimin sigur Marita Petersen, tingkvinna, sum í gjár setti løgmanni munnligan fyrispurning á tingi um, hví hann hevði sett Árna Olafsson frá.

Jan Muller

Nu tað hevur verið breið semja millum flest allar tingmenn og somuleiðis landsstýrismenn, at tað er sera umráðandi at føroyingar standa saman og draga eina linu í øllum oljumálinum, hevur løgmaður nu eftir øllum at døma við avgerð síni at koyra Árna Olafsson frá sum formann í Oljuráðleggingingarnevndini sett kíla í oljuhjólið, sum annars var so væl koyrandi.

Hetta var niðurstøðan fleiri tingmenn gjørdu sær á tingi í gjár, tá løgmaður svaraði munnligum fyrispurningum frá Maritu Petersen, tingkvinnu javnaðarfloksins.

Hon spurdi løgmann hví hann hevði tikið stig til at koyra Árna Olafsson frá og í hvønn mun viðgerðin av málinum samsvaraði við tá mannagongd, sum annars eigur at verða brúkt í slíkum máli.

Løgmaður vísti í svari sínum til tá tíðindaskriv, sum er sent út um málið og legði annars afturat, at eitt slíkur fyrispurningur átti als ikki at fingið innivist í tinginum, tí tað snúði seg um navngivnar persónar og annars var talan um eitt alvarsligt mál, sum ikki átti at verða viðgjørt í tinginum á henda hátt.

Misnøgd við løgmann

Tingmenn úr javnaðarflokkinum, tjóðveldisflokkinum og úr sjálvstýrisflokkinum vístu á sína stóru misnøgd við handfaringina hjá løgmanni av hesum málinum. Niðurstøða teirra var, at tað er sera óheppið av løgmanni, nú oljulóggávan liggur til viðgerðar í tinginum og nú vit skulu til at skipa fyri eini útbjóðing, at løgmaður tekur slíkt stig uttan at ráðføra seg við nakran, eitt nú uttanlandsnevndina.

Tingmenn hildu, at Árni Olafsson hevði gjørt eitt sera gott og slóðbrótandi arbeiði og dugdu tí ikki at síggja, hví hann ikki skuldi halda fram við uppgávuni.

Løgmaður vísti á, at hann prioriteraði marknamálið mest og hevði tí tikið hesa avgerð. (Víst verður til samrøðu við løgmann á síðu 8 í blaðnum um tað sama, blaðm.)

Eiga at vera varin

Marita Petersen sigur við Sosialin, at tað løgmaður hevur fyritikið sær í hesum málinum er sera óheppið.

-Løgtingsmenn hava verið sera varnir við at viðgera oljuviðurskiftir, markið og annað við tilknýti til tað, í tingsalinum, tí vit hava verið bangin fyri, at hetta kann skapa órógv. Tí gjørdist eg sera kløkk og bilsin, tá eg hoyrdi, hvat løgmaður hevði gjørt. Eg helt, at hetta málið var av so almennum týdningi, at tað átti at koma fram í tinginum.

Marita Petersen sigur, at tað, sum tingviðgerðin vísti, er, at tað er ikki Árni Olafsson, sum hevur biðið um at sleppa úr nevndini vegna ov stóra arbeiðsbyrðu, men at tað er løgmaður, sum hevur gjørt av, at hann skal ikki vera í Oljuráðleggingarnevndini longur.

Marita Petersen er annars ikki ósamd í tí, at vit nokk skulu hava eina aðra skipan í sambandi við oljuráðgeving, nú vit hava valt eitt vinnumálastýri, men hon heldur tað var sera óheppið av løgmanni at gera hetta nú.

-Tað átti at verið bíðað við hesum, til lógin varð samtykt og at tey boðini vóru send greitt út.

-Heldur tú avgerð hjá løgmanni kann fáa nakrar óhepnar avleiðingar fyri okkum?

-Eg vóni, at henda støðan hjá løgmanni ikki fær nakra negativa ávirkan á leiklutin hjá Árna Olafssyni í sambandi við marknasamráðingarnar.

Marita Petersen vísir á, at løgmaður í fleiri førum hevur víst á, at vit mugu standa saman og ikki koma út við nógvum ymsum signalum mótvegis umheiminum.

-Eg haldi, at hetta signalið frá løgmanni er sera óheppið. Sjálvt um vit í tinginum eru ósamd um nógv, so hava øll tey, sum hava havt nakað við oljumálið at gera, verið samd um, at hetta er eitt mál, har vit úteftir skulu royna at senda eitt og sama signal.

Marita Petersen vísir í hesum sambandi á, at um løgmaður veruliga helt, at tað var so týdningarmikið at taka Árna Olafsson úr Oljuráðleggingarnevndini, so átti hann fyrst at kunna uttanlandsnevndina og greiddi henni frá grundgevingunum aftanfyri hesa avgerð. Men tað hevur løgmaður ikki gjørt.

-Metir tú, at løgmaður hevur koyrt Árna Olafsson frá?

-Tað er so ógvusligt at siga, men hann hevur í hvussu er fingið boð um at fara frá.

Marita Petersen sigur víðari, at málið møguliga skal skiljast soleiðis, at tað er óheppið, at sami persónur situr í Oljuráðleggingarnevnd, sum situr og samráðist. Men hon vísir á, at tað sita fleiri persónar í nevndini, sum eisini eru í samráðingarnevndini, bæði danir og føroyingar.

-Kann hetta hava nakað við tað at gera, at løgmaður við hesi avgerð vil útvega sær betri rásarúm, nú tá avgerðir skulu takast í sambandi við oljulóggávu og útbjóðing. Higartil hevur hann bæði tá tað galt um marknasamráðingar og um menningina av oljumálinum verið noyddur til at brúka sama mann í síni ráðgeving og arbeiði!

-Tað eiga tit at spyrja løgmann um.

Vonandi verður skaðin ikki ov stórur

Marita Petersen vónar, at skaðin, sum er hendir í hesum málinum, ikki verður ov stórur og at hann fer at fevna um annað eisini.

-Løgmaður átti at bíðað við slíkari avgerð til eftir lóggávan varð komin uppá pláss.

Undir viðgerðini av málinum í tinginum í gjár vísti løgmaður annars aftur atfinningunum frá tingmonnum og segði, at tað, ið varð gjørt, var ein bæði praktiskur og effektivur máti, at fáa tingini at virka uppá - nú tveir av stjórunum í Tinganesi komu uppi málið í hesum síðsta partinum av málinum. Harvið knýtti tú arbeiðið hjá Oljuráðleggingarnevndini til tá umsiting, sum skal arbeiða við málunum.

Jóannes Eidesgaard, formaður javnaðarfloksins setir spurnartekin við um løgmaður mundi hava reint mjøl í posanum og helt fyri, at tað hann hevði gjørt var illa umhugsað.

Heine O Heinesen, úr tjóðveldisflokkinum setti spurnartekin við leiklut løgmans í øllum hesum og sipaði her til uppnevning hansara í Vinnunevndini. Hann spurdi um nakar politikkur lá í øllum hesum og annars um Árni Olafsson hevði fingið nakað víðari mandat til at samráðast við bretar út frá.

-Er t.d. uttanlandsnevndin við í øllum hesum spælinum spurdi hann. Jógvan Durhuus úr Tjóðveldisflokkinum helt tað eisini vera løgið, at Vinnumálastjórin fyrst ikki kundi vera limur í Oljuráðleggingarnevndina fyri síðani at kunna vera ikki bert limur men formaður kortini.

Marita Petersen úr javnaðarflokkurin heldur tað vera sera óheppið, at løgmaður hevur sett Árna Olafsson, formann í Oljuráðleggingarnevndini frá

Árni Olafsson hevur staðið á odda fyri Oljuráðleggingarnevndini øll árini. Nú skal hann burturav taka sær av marknaúisemjuni sigur løgmaður

Edmund Joensen, løgmaður heldur einki løgið vera í tí at láta Árna Olafssom taka sær av marknamálinum burturav